# Bilaprísirnir hækka 10-15%

**Frá 1. oktober í ár kunnu vit vænta, at bilaprísirnir í Føroyum fara at hækka eitt lítið vet. Hetta kemst av, at ES krevur nú av øllum bilframleiðarum, at bilarnir verða seldir til sama prís til øll lond í ES**




*1. oktober kunnu vit vænta, at bilaprísirnir í Føroyum fara eitt vet upp. Hvussu nógv ber ikki til at siga enn, men tilsamans eiga vit at rokna við einum vøkstri uppá 10 – 15%, metir Eivind av Reyni, stjóri á Reyni Service*

*Savnsmynd*

BILASØLA
*Ingrid Bjarnastein*

Avgjøldini á bilum í Danmark eru munandi hægri enn í øðrum ES londum. Tí hevur Danmark fingið bilarnar frá teimum ymsu bilframleiðarunum bíligari, soleiðis, at tá avgjøldini eru komin á, so verður bilurin ikki ómenniskjasliga dýrur at keypa. Men frá 1. oktober fer ES at krevja, at allar bilframleiðarar skulu selja bilar sínar til sama prís til øll ES lond. Hetta merkir, at Danmark nú skal gjalda tað sama fyri bilarnar sum til dømis Svøríki, men í Svøríki eru avgjøldini nógv lægri. Og av tí, at flestu bilasølurnar í Føroyum fáa bilar sínar ígjøgnum Danmark, kemur hetta eisini at ávirka føroysku bilprísirnar.

– Hetta fer eisini at ávirka Føroyar, tí flestu bilasølurnar í Føroyum fáa bilar sínar ígjøgnum Danmark, sigur Eivind av Reyni, stjóri á bilasøluni Reyni Service.

– Hvussu nógv tað verður í prosentum, dugi eg ikki at siga enn, men ein kann vænta, at tað fer at liggja ímillum 10 og 15 %.

### Ikki alt í senn

Men tó skulu føroyingar og danir fyri tann saks skuld ikki halda, at bilaprísurin ger eitt stórt lop uppeftir tann 1. oktober.

– Hetta verður ikki nakað, sum fer at henda soleiðis alt fyri eitt. Tær flestu bilasølurnar hava tikið hædd fyri hesum síðani fyrst í árinum, og tí kemur ein ikki at merkja tað so væl, greiðir Eivind av Reyni frá.

Sjálvt um tað so kundi hugsast, at bilasølurnar í Føroyum eftir tann 1. oktober fóru at keypa bilarnar aðrastaðni frá, heldur Eivind av Reyni, at tað verður tað helst ikki talan um.

– Tað kundi sjálvsagt hugsast, at vit valdu at keypa bilarnar aðrastaðni frá, men soleiðis verður tað helst ikki. Danmark hevur jú fingið bilarnar bíligari, tí skrásetingargjaldið og tollurin hevur verið so høgur, og tað hava vit í Føroyum bara notið gott av. Men eg rokni við, at vit framhaldandi fara at keypa bilar okkara úr Danmark.

Eivind av Reyni sigur eisini, at Toyota bilar í Japan fara í næstum at royna at savna tann evropeiska marknaðin á einum staði. Hetta hevur við sær, at um árskiftið verða allir bilarnir til til dømis Noreg, Svøríki, Danmark, Føroyar, Ísland og so framvegis avskipaðir í Malmö. Og her fer so at vera ein Toyota høvuðsgoymsla.

Men Eivind av Reyni metir ikki, at tað fer at loysa seg at fáa bilarnar aðrastaðni frá enn úr Danmark, tí í síðsta enda fer hetta alt at kosta eins nógv.

### Stórur eftirspurningur

Orsakað av prísharmoniseringini, sum hetta verður kallað, hevur eftirspurningurin av bilum verið ógvuliga stórur. Onkur hevur enntá havt á munni, at Reyni Service fór ikki at fáa nýggjar bilar fyrr enn í november mánaða.

– Hetta kemst av hesi sokallaðu prísharmoniseringini. Eftirspurningurin hevur verið stórur, og tí eru tær ymsu goymslurnar tømdar skjótari enn vanligt. Hetta ger eisini leveringstíðina longri, og um tú ynskir eitt serligt modell ella eina serliga farvu, kann tað taka millum 3-5 mánaðar at fáa ein bil. Men vit hava roynt at gjørt tað á tann hátt, at vit fáa nýggjar bilar inn hvønn mánaða, sigur Eivind av Reyni at enda.

# Listastevnan í holt við stórar sagnir

**Listastevnan 2002, sum nú er meira enn komin í helvt fer í dag í holt við stóru sagnirnar**

LISTASTEVNUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Nú eru bert fýra dagar eftir av 16 daga longu Listastevnuni, sum byrjaði tann 3. august. Men enn er hon ikki liðug, og so verri enn so. Nú setir Liststevnan skjøtil á tær stóru sagnirnar. Tær um Sjúrð, sum vá á Orminum, um bannaða gullið úr Rín og um Beowulf.

Í dag, hósdagin, klokkan 17.00 fer íslendski lektarin, Heimir Pálsson at greiða frá um Eddukvæðini í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Hesi kvæðini vórðu skrivað av íslendingum í umleið ár 1275.

Eisini greiðir íslendski lektarin frá um granskingarúrslit og hugleiðir um mál og viðurskifti, sum kunnu tykjast ógreið, men sum hann tó hevur eitt boð um.

Ein hugsan lektarans er, at kvinnurnar hava hildið lív í søgunum, meðan menninir hava verið í bardaga.

Heimir Pálsson hevur verið ráðgevi hjá New York bólkinum, Sequentia í samband við Edduframførslur kring heimin.

### Sjúrðakvæðini

Fríggjadagin klokkan 17.00 fer Eyðun Andreasen, professari og dr. phil., at samanbera søgurnar í íslendsku Eddukvæðunum við føroysku Sjúrðakvæðini. Eisini samanber Eyðun málsligan og annan skyldskap millum føroyska kvæðayrking og norrøna skaldskapin á bundnum máli. Hesin sami fyrilestur verður eisini hildin í Klaksvík sunnudagin klokkan 16.00.

Hesir báðir fyrilestrarnir hjá Eyðuni og Heimir eru knýttir at stóru Edda-framførsluni í Norðurlandahúsinum, hjá Sequentia. Hon verður í Høllini leygarkvøldið og sunnukvøldið.

Hóskvøldið klokkan 19.30 fer Benjamin Bagby at framføra leikin »Beowulf« á gamla Meiarínum í Havn. Benjamin Bagby, sum er leiðarin í leikbólkinum Sequentia, spælir og kvøður hetjukvæði Beowulf við hørpu og dolki. Hetta er einasta søgnin, sum er varðveitt á fornenskum máli.

Beowulf er hetjan, sum skal hjálpa danska kongin-um Hrothgar í stríðnum ímóti ódjórinum Grendel.

Eddu-framførslan er størsta tekniska avbjóðing, Norðurlandahúsið hevur verið fyri síðani húsið varð tikið í brúk fyri skjótt 20 árum síðani. Umframt alskyns talgilda tøkni, skulu jarnbreytaskinnarar festast í gólvið.

So tað verður ein spennandi finala í Norðurlandahúsinum hjá Listastevnu Føroya leygarkvøldið og sunnukvøldið.



# Ovastevnan gav 280.000 krónur brutto

**– Hetta er 100.000 krónur meira enn seinasta ár, sigur Anny Niclasen, limur í stuðulsnevndini**

BYGDASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*



*280.000 krónur brutto; tað var peningaliga úrtslitið av ovastevnuni í ár*
*– Øll tiltøkini góvu meira í ár enn nakrantíð áður, sigur Anny Niclasen, limur í stuðulsnevndini fyri svimjihyli*

Enn veit eingin at siga, hvussu nógv fólk var á Ovastevnu í ár, men talið var stórt, nógv størri enn nakrantíð áður.

Týskvøldið hevði stuðulsnevndin fyri svimjihyli fund, og tá taldu tey upp, hvussu nógv tey ymisku tiltøkini góvu í peningi.

Anny Niclasen, sum er limur í stuðulsnevndini, sigur, at ovastevnan í ár gav 280.000 krónur brutto, og tað eru 100.000 krónur meira enn seinasta ár.

– Men nógvar útreiðslur eru knýttar at stevnuni og ymisku tiltøkunum. Vit vóna tó, at einar 150.000 krónur eru eftir, tá ið avtornar.

### 800 fólk dansaðu

Anny vísir á, at dansurin í tjaldinum í skúlagarðinum fríggjakvøldið og leygarkvøldið gav mest í brutto.

– Fríggjakvøldið, tá ið Countrybólkurin úr Klaksvík spældi, vórðu 230 atgongumerki seld og leygarkvøldið, tá ið Terji og nólsoyingar spældu, var talið 575. Í fjør seldu nólsoyingar ávikavist 170 og 400 atgongumerki.

Anny sigur, at nógvar útreiðslur eru knýttar at dansinum í tjaldinum.

– Tónleikabólkarnir og leigan av tónleikaamboðum kostaðu stívliga 30.000 krónur, og nú eigur stuðulsnevndin eisini tjaldið, sum hevur kostað okkum nógvan pening. Tað verður so ikki ein útreiðsla komandi ár.

Hon sigur, at tombola, skjótibreytin og 21-spælið góvu nógvan pening, men eisini her fer ein partur útaftur í keypi av vinningum.

– Nakrir lutir verða latnir innaftur, og tí er enn ikki endaliga uppgjørt, hvat nettotalið verður, sigur Anny, sum leggur aftrat, at stuðulsnevndin eigur básarnar, sum nýttir verða á stevnuni.

Vælumtókta kabarettin gav eisini væl av peningi, 29.000 krónur í mun til 25.000 krónur seinasta ár.

– Tey, ið luttaka í kabarettini, gera tað ókeypis. Einastu útreiðslurnar, er leigan av Royndarhúsinum, sigur Anny.

### Øll tiltøkini góvu meira

Stuðulsnevndin er sera væl nøgd við undirtøkuna, sum Ovastevnan fekk í ár.

– Hetta er besta árið nakrantíð, so vit eru ógvuliga væl nøgd og takksom fyri stuðulin. Øll tiltøkini hava givið meira í ár, enn tey nakrantíð áður hava givið, sigur Anny.

Spurd, hvat nevndin ítøkiliga fer at gera við peningin, sigur hon, at tey hava tosað um at fáa stoypiarbeiði í svimjihylinum undir land.

Anny Niclasen dugir tó ikki at siga, hvussu langt peningurin røkkur.

# Fiskaloysi bæði í føroyskum og íslendskum sjógvi

**Norðbúgvin landaði á Havsbrún týsdagin, og væntandi kemur Tróndur í Gøtu eisini inn at landa í hesi vikuni**
**– Beint nú er fiskaloysi bæði í føroyskum og íslendskum sjógvi, sigur Jákup Oluf Joensen á Havsbrún**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Á Havsbrún vænta tey, at Tróndur í Gøtu kemur inn at landa í vikuni. Í gjár høvdu teir 1600 tons av svartkjafti inni. Tróndur hevur roynt í føroyskum sjógvi*

Tá ið Havsbrún frætti frá Tróndi í Gøtu mánadagin, høvdu teir 1600 tons av svartkjafti inni. Í gjár høvdu teir somuleiðis 1600 tons, so hesar fyrstu dagarnar í vikuni hevur verið rættiligt fiskaloysi á føroysku svartkjaftaleiðunum.

– Tað var soleiðis, at tá ið Tróndur í Gøtu byrjaði nýggjan túr, vóru føroysku nótaskipini í íslendskum sjógvi. Har var tó lítið og einki at fáa. Tróndur leitaði og kastaði í føroyskum sjógvi og fekk 700 tons tey bæði fyrstu samdøgnini. Tí komu hini skipini eisini í føroyskan sjógv at royna, sigur Jákup Oluf Joensen.

Hann væntar, at Tróndur í Gøtu kemur inn at landa í vikuni.

Hini skipini, sum í løtuni eru á svartkjaftaleiðunum, Christian í Grótinum, Krúnborg og Krúnan, hava lítið inni.

Ellefsen-menninir í Vágunum eiga Krúnuna, men skipið hevur verið lítið at sæð her um okkara leiðir. Krúnan landar fyri tað mesta í Danmark.

### Norðbúgvin við 600 tonsum

Týsdagin landaði Norðbúgvin 600 tons av svartkjafti á Havsbrún. Teir fingu fiskin í føroyskum sjógvi. Norðbúgvin er skipið hjá Bjarta Mohr og er eisini lítið at síggja her um okkara leiðir.

Jákup Oluf Joensen sigur, at tað kann vera so undarligt við svartkjaftinum.

– Skipini leita og fáa ikki livandi. Men so knappliga kunnu tey renna seg í svartkjaft. Beint nú fæst lítið og einki í føroyskum og íslendskum sjógvi, sigur hann.

## Stuðulssvimjing, dansur og tombola

STUÐULSSVIMJING
*Vilmund Jacobsen*

Enn hevur stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy ikki tikið tjaldið í skúlagarðinum og tivolibásarnar á Nýggjavegi niður.

Leygardagin komandi verður árliga stuðulssvimjingin um Nólsoyarfjørð, og tá ætlar stuðulsnevndin fyri svimjihyli at skipa fyri dansi og tombola í Nólsoy.

Tá ið Sosialurin mikudagin tosaði við Anny Niclasen, sum er limur í stuðulsnevndini, var ikki endaliga avgjørt, hvussu dagurin verður skipaður.

– Men vit ætla at hava dans í tjaldinum hetta kvøldið og tombola. Í vikuni verður greitt, hvussu hesin dagurin – eftir svimjingina – verður lagdur til rættis, og hvørji tiltøk verða á skránni, sigur Anny Niclasen.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg